# Frá Disneyleiki til

Um kvøldarnar spælir hann ein av høvuðsleiklutunum í Beauty and the Beast - størstu uppsetingini í Skandinavia nakrantíð. Um dagin lesur hann stjørnmálafrøði á universitetinum. Klaksvíkingurin Annfinnur Heinesen livir eina dreymatilveru sum sjónleikari í Keypmannahavn, men framtíðardreymurin er at koma heim. Heim til Føroyar at seta politiskar leikir á pall



*- Ongin orkar at noyðast upp hvønn morgun at broyta heimin, men sum sjónleikari havi eg kanska møguleikan av og á. Spurningurin er so, um eg ikki eisini havi skyldu til at brúka hann.*
*sigur Annfinnur Heinesen, sjónleikari*

*Mynd: Bárður Lydersen*

PORTRETT

*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

- Hetta er simpelthen fantastiskt. Ein sannur dreymur fyri ein sjónleikara. Ella tú kanst kalla tað heimsins besta studiejobb, smílist 29 ára sjónleikarin Annfinnur Heinesen. Hetta seinasta árið hevur han verið annar av tveimum leikarum sum Cogsworth og Gaston í Disney sangleikinum Beauty and the Beast á Det Ny Teater í Keypmannahavn – samstundis sum hann er í ferð við at útbúgva seg til stjórnmálafrøðing.

## Á toppinum – hvørja ferð

Annfinnur kennir seg sera hepnan í løtuni. Hann hevur sjáldan verið í so góðari venjing sum sjónleikari, fær góða løn fyri tað, umframt at hann hevur møguleika at taka enn eina útbúgving – í einum landi, har út við helvtin av øllum sjónleikarum eru arbeiðsleysir.

- Eg arbeiði eisini hart fyri tí, sigur hann og nevnir sum dømi, at á flestum sjónleikarhúsum spæla tey bert 5 sýningar um vikuna í ein mánað ella tveir, meðan Beauty and the Beast hevur verið sýndur 6-8 ferðir um vikuna í eitt heilt ár.

Spurdur, um tað yvirhøvur ber til at hava hjarta við, tá tú spælir ein leiklut so ofta, sigur Annfinnur, at so løgi tað ljóðar, so er tað sum við víni - tað verður betri við tíðini.

- Við nógvu venjingini verður tú tryggari í leiklutinum og fært størri yvirskot til at verða kreativur við smálutum og soleiðis geva tað allarbesta av tær sjálvum hvørja ferð. Hetta eru stórir leiklutir, og har sita fleiri enn 1000 fólk og hyggja, so eg kann snøgt sagt ikki loyva mær ikki at vera á toppinum hvørt kvøld – hvørki móti mær sjálvum, mínum viðleikaraum og allarminst áskoðarnum. Fyri tað, um eg kanska spæli leiklutin fyri 117. ferð, er tað mest sannlíkt fyrstu ferð, áskoðararnir síggja hann. Ein leikari, sum ikki hevur ta virðingina fyri áskoðarnum til hvørja einastu sýning, hevur onki at gera á einum palli.

Sum sjónleikari er stuttligari at spæla Cogsworth, heldur Annfinnur. Ikki bara tí hann sleppur at spæla saman við Preben Kristensen, men serliga tí Cogsworth er ein gjøgnumførdur karakterur, sum skal byggjast upp frá grundini. Leikluturin sum Gaston hevur hinvegin ikki tann heilt stóra boðskapin uppá hjarta, nokkso grunnur ella eindimensiónellur, men tekniskt er hann krevjandi koreografiskt og serliga sangliga við fleiri solopartíum.

- Slíkt krevur, at tú ert í venjing og dugir at brúka tíni amboð. Týdningarmesti lærdómurin í hesum fakinum er, at tú til einhvørja tíð kanst endurtaka teknikkin í ymiskum uppgávum. Hevur tú lært tað, kanst tú í prinsippinum átaka tær einhvønn leiklut, sum tú síðani fyllir út við tær sjálvum.

## Trong rók

Tað er týðiligt, at Annfinnur brennur fyri sínum faki. Sjónleikur hevur verið hansara lív seinastu nógvu árini og er eisini ein týdningarmikil partur av hansara framtíðardreymum. Tí kann tað undra, at Annfinnur við síðuna av sjónleikinum hevur valt at lesa stjørnmálafrøði

Annfinnur flennir.

- Og eg lesi also ikki bara stjórnmálafrøði fyri at hava okkurt meir skilagott at fella aftur á. Eg eri fyrst og fremst sjónleikari, og tað eri eg av nógvum persónligum orsøkum. Mær dámar tað væl, tey siga, at eg dugi tað væl, og líka sum øll onnur havi eg brúk fyri viðurkenning og at verða tikin fyri fult. Í Føroyum er tað framvegis soleiðis, at sigur tú, at tú ert sjónleikari, so biðja fólk teg siga okkurt stuttligt. Tað eru undantøk, treyðugt so, men í stóran mun er sjónleikur í Føroyum beindur á eina ræðuliga tronga rók, sum eitur undirhald. Óviðkomandi og tannleyst - tíverri.

- Eg vil øgiliga gjarna geva mítt íkast til at sjónleikur her heima eisini verður annað og meir. Dreymurin er kanska einaferð at skriva leikir sjálvur, men í øllum førum ímyndi eg mær, at eg onkursvegna kann brúka tankagóðsið frá stjørnmálafrøðini í einum føroyskum sjónleikahøpi.

## Idealisturin

Partur av hesum dreyminum hjá Annfinni er at fáa føroyskan politikk og etiskar spurningar við í leikin. Hann hevur, saman við øðrum, skrivað og spælt nógvar ólavsøku-kabarettir, og mong minnast ivaleyst Annfinnur í leiklutinum sum drotning Margretha á Doktaragrund á Ólavsøku – ein leikur, ið skuldi fáa okkum at rakna úr rúsinum í kjalarvørrinum á nýligu drotningavitjanini.

- Ætlanin við Drotningarøðuni, sum eg skrivaði saman við Allan Dalsgarð, var at vísa tann ofta fullkomiliga absurda hugburðin føroyingar hava til kongshúsið.

## Blá bók

Annfinnur Heinesen
29 ár, búsitandi í Keypmannahavn
Útbúgvin sjónleikari frá Odense Teater í 2001
Leiklutir: Síðani sín fyrsta leiklut sum Jónathan í Brøðurnir Leyvuhjarta í 1995 hevur Annfinnur Heinesen havt eina røð av leiklutum í kabarettum, leikum og sangleikum bæði í Føroyum og Danmark. M.a kunnu nevnast:
Dreymur Jóansøkunátt, Oliver Twist og Skeyk.
En Eventyrrejse til Færøerne (Imagine Theater)
Richard d. 3., Terningerne er kastet (Odense Teater)
Krystalnatten (Baggaardsteateret & Turbinehallerne)
Forfølgelsen (Den danske Filmskole)
Sound of Music, Beauty and the Beast (Det Ny Teater)